Nr. 4 | 15. juni 2008 | 61. árið

# Kirkjuligt Missiónsblað

# Sí, nú er tað ein frelsudagur

TAÐ neit hinum almáttuga og miskunnsama Gudi í hjartað, at øll tey, sum hann hevði skapað til at vera børn síni, skuldu glatast. Tessvegna tók hann í náði síni til tey frelsuráð, sum ikki vóru uppkomin í nøkrum mannahjarta. Orðið varð hold — t. e. Gud var í Kristusi — »í honum búði øll fylling guddómsins likamliga«; og í hesi menniskjaveru síni gjørdi Gud heimin sáttan við seg. Kristus gjørdist hin annar Ádam og tók á seg at standa lógini til svars mannaættarinnar vegna. Fyri at siga tað við fáum orðum, so gjørdi hann tað, sum vit áttu at gera, og leið tað, sum vit áttu at líða. Á henda hátt gjørdi Gud heimin sáttan við seg — hann uppfylti lógina, varð revsaður okkara vegna, bøtti aftur tað, sum vit høvdu brotið, og við at sigra á deyða, djevli og helviti, vann hann æviga loysn fyri allar menniskjur.

»Og hann tilroknar teimum ikki misgerðir teirra.« Ella sagt við øðrum orðum: Eins og Gud framman undan syndafallinum sá heimin í Ádami, og alt var »sera gott«, soleiðis sær hann nú allar menniskjur náðaðar í hinum elskaða. Efes. 1,6. »Meðan vit enn vóru fíggindar, vórðu vit sátt við Gud við deyða sonar hansara.« Róm. 5,10.

»Hann hevur lagt niður í okkum orðið um sáttargerðina,« — tað orðið, sum ber okkum boð um endurloysnina í Kristi Jesusi. Og nú er tað, »sum var tað Gud, ið áminti við okkum. Verið sátt við Gud.« Tí at Gud er longu sáttur við tykkum; men nú mega tit lata tykkum sætta við hann; tá fyrstani er alt sum tað eigur at vera. Komið aftur, tit burturfarnu, trúleysu synir! Faðirhjartað og faðirføvningurin hava leingi verið opin har heima. Faðirhúsið hevur leingi staðið opið, og hini bestu klæðini hava leingi ligið og bíðað. Einki nýtist tykkum at gera til tess at sætta Faðirin; tí at hann var sjálvur í Kristusi og gjørdi heimin sáttan við seg; nú eru tað tit, sum mega lata tykkum sætta við Gud.

Her síggja vit, hvat ið gleðiboðskapurin í veruleikanum er. Og vit eiga her fyrst av øllum at geva gætur eftir, at gleðiboðskapurin er eingin fyrijáttan, men hann er boðskapurin um fyrijáttanir, sum eru vorðnar uppfyltar. Tí mong eru tey, sum ikki hava fingið fatur í, at gleðiboðskapurin talar ikki um nakað, sum skal henda, men um nakað, sum er hent. Luther sigur soleiðis: Gleðiboðskapurin er eini tíðindi, sum verða rópt út, ein boðskapur um nakað, sum er vorðið veruleiki og verður standandi,

Hjartaliga vælkomin á summarstevnuna 2008, sum verður í Føroya Fólkaháskúla í Havn í døgunum 26. - 29. juni! Les meira inni í blaðnum.

Kirkjuliga Missiónsfelagið

annaðhvørt vit taka við tí ella ikki, og sum stendur, annaðhvørt vit trúgva tí ella ikki.

Tað er her, at mong trilva sum í blindum. Gleðiboðskapurin er fyri teimum ikki vorðin nakar gleðiboðskapur; tí tey hava ikki upplivað hann sum eini góð og gleðilig tíðindi. Tey halda framvegis, at Gud má blíðkast og syndin leggjast av; tey duga ikki at síggja, at Gud er blíðkaður og at syndin er tikin burtur. Á henda hátt verður eingin gleðiboðskapur, og hetta samsvarar ei heldur við orð Guds. Tí gleðiboðskapurin talar um nakað, sum longu er hent; hann sigur: »Gud gjørdi í Kristusi heimin sáttan við seg.« »Meðan vit enn vóru fíggindar, vórðu vit gjørd sátt við Gud við deyða sonar hansara.« »Troystið, troystið fólk mítt! sigur Gud tykkara. Talið blídliga til Jerúsalem og boðið henni, at stríð hennara er á enda, at sekt hennara er goldin, at hon hevur fingið tvífalt av Harrans hond fyri allar syndir sínar.« Jesaja 40,1—2.

Alt tað, sum her verður talað okkum til uggarnar, er longu hent; Gud er blíðkaður, vit eru vorðin sátt við Gud, og skuldin er goldin. Gævi Gud, at vit kundu fingið náði til at trúgva, at øll synd í hesum heimi, eisini tann syndin, sum nú nívir okkum niður, varð beind burtur fyri meira enn 1900 árum síðani, tá ið Kristus doyði, og at hon varð søkt í hitt djúpasta havið, — soleiðis at Gud longu tá varð sáttur, og »ein ævig rættvísi tá varð leidd fram«. Tað hevði av sonnum verið ein gleðiboðskapur.

Men tað finst uppaftur meira av ógreiðu í hesum máli. Tí at mong eru tey, sum trúgva, at í deyða Krists hendi ein sáttargerð; men tá ið tey sjálvi skulu gera nýtslu av hesi sáttargerð, so vita tey ikki, hvat ið hon ber í sær. Aftrat hesum verða so nógvar treytir heftar við, ið sagdar eru at vera í Skriftini, at tað verður eins torført at fáa nakað gagn av hesi sáttargerð, sum tað hevði verið at vunnið sær rættvísi eftir lógini, um eingin sáttargerð hevði verið gjørd.

Og alt hetta kemst av, at orðið um sáttargerðina verður ikki lisið soleiðis, sum tað stendur skrivað. »Meðan vit enn vóru fíggindar, vórðu vit gjørd sátt við Gud við

ANDAKT

## Tungur líkasum av eldi

Eldurin er ein veldig og uppetandi megi. Ein herjandi eldsbruni kann leggja alt oyði, eldsins hiti og ørskapur kunnu drepa bæði djór og fólk. Men eldurin hevur eisini ómissandi evni. Hann er ein reinsandi megi, sum brennir alt óreint og óektað burtur. Og undir røttum umstøðum er eldurin eisini ein lívgevandi hiti, sum vit nýta bæði í matgerð og sum verja móti vetrarkuldanum.

Tann brennandi login verður í Bíbliuni mangan nýttur sum tekin um Heilaga Andan: Gud opinberar seg fyri Mósesi í einum brennandi tornarunni. Jesaja verður í eini sjón reinsaður fyri synd sína við eini glóð. Jóhannes doyparin talar um, at tá Jesus kemur, skal hann doypa okkum við Heilagum Anda og eldi. Og tá Heilagi Andin hvítusunnudag fyllir ápostlarnar, sýnir hann seg sjónliga sum tungur av eldi á høvdum teirra.

Tá vit liva við Jesusi og eru doypt til at hoyra honum til, hava vit Heilaga Andans eld sum gávu. Heilagi Andin brennir í okkum við Guds megi fyri at styrkja okkum til tænastu. Vit verða fylt av dirvi og hugsjónum fyri Guds ríki, tá vit lata Guds eld tendra okkum. Men Heilagi Andin virkar eisini sum ein logandi pína í lívi okkara. Tí hann lýsir okkara myrku rúm upp og setur sjóneykuna á syndina. Heilaga Andans eldur vil reinsa okkum, so at vit í øllum lutum liva í Guds ljósi.

Tað hendir bara ikki av sær sjálvum, at eldurin gevur okkum megi og reinsar okkum. Vit kunnu veruliga forða báðum tveimum. Tí sigur Paulus: “Sløkkið ikki andan” (1 Tess 5,19). Eins og eitt bál kann verða sløkt við vatni, kunnu vit sløkkja andan, um vit liva í synd og halda áfram við ólýdni. Eitt bál kann eisini verða sløkt við ikki at fáa meira brenni. Tí mugu vit halda eldinum í gongd við bøn, bíbliulesnaði, boðan og samfelagnum í meinigheitini.

Trine & Uffe Kronborg
í “Levebrød”, Lohse 2002, ØK umsetti.

deyða sonar hansara,« stendur skrivað. Men hesum verður ikki trúð. Og heldur ikki orðunum um, at »Gud gjørdi allan heimin sáttan við seg, so at hann tilroknar teimum ikki misgerðir teirra.« Hóast tað verður játtað við munninum, so er kortini niðurlagið í hjartanum: Ja, men tað eru bert tey gudrøknu og tey angrandi og trúgvandi, sum verða sátt við Gud.

Tá ið so gleðiboðskapurin býður í brúdleyp náðinnar — og Jesu orð ljóða: Komið, tí at alt er tilgjørt! — vendir vantrúgvin orðunum við, so at tey ljóða: Bíða eitt sindur, eina lítla løtu enn, til tess at alt er tilgjørt!

Ja, sigur tú, men tað ber ikki til at fara, fyrr enn vit hava gjørt okkum tilreiðar; tí at vit mega

fyrst iðra okkum um syndina og venda við. — Men Skriftin sigur: »Tann, sum tystur er, hann komi! Hvør, sum vil, hann taki lívsins vatn fyri einki!«

Búgvin at koma til Jesus er ein og hvør sál, sum er komin í neyð við synd síni, og ynskir at koma; um aðra menniskjansliga tilbúgving enn hesa talar Skriftin ikki.

Og um tú heldur, at tað finnast menniskjur, sum ikki hava loyvi at koma til Jesus, so fert tú skeivur; tí at »hvør, sum vil, hann taki lívsins vatn fyri einki!«

Orsøkin til, at ikki øll verða frelst, er tann sum Jesus bendir okkum á í 22. kapitli hjá Matteusi, tá ið hann sigur frá teimum, sum boðin vóru í brúdleyp. »Tey vildu ikki,« tað var vanlukkan.

Meðan menniskjan svevur fast í syndasvøvni, ber hon seg undan, tí at hon er bundin av bøi, handilsskapi ella heimi. Og tá ið hon síðani er vakt, fer hon at leita sær frelsu í øllum øðrum, enn við at taka ímóti Kristusi og lata náðina vera náði.

Umvendingin og iðranin og niðurnívingin hevur tað eina endamálið, at reka menniskjuna til Kristusar. Gal 3,24. Tá ið tey síðani eru leidd hagar, at tey vilja koma, vaknar hjá teimum hetta hjartasuffið: »Gævi at eg hevði kunnað komið til Jesus! Gævi at Gud fyri Jesu skuld hevði viljað fyrigivið mær alt tað, sum eg havi gjørt! Og gævi at eg hevði kunnað trúð, at náði er eisini til mín!« — og annað meira. Tá er rætta stundin komin. Tá kanst tú halda uppat við øllum egnum strevi — tí at »alt er tilgjørt!« Kom!

Um innbjóðing sína annars sigur Harrin: »Leið inn higar fátæk og kryplingar og blind og hølt, — og noyð tey at koma inn, fyri at hús mítt kann verða fult.« Hevja upp eygum tínum, so at tú sært, hvat ið Jesus her sigur! Kryplingar — hølt •— og blind! Noyð tey at koma inn — alt er tilgjørt!

Vit fara her at endurgeva nøkur merkisverd orð, sum J. A. James hevur sagt. Hann tekur nakað soleiðis til: »Ofta biðja tey leitandi við at koma til Jesus, tí at tey rokna við at fáa eitt innari kall til at trúgva. Tí leita tey og biðja, men skilja ikki, at tey beinan vegin eiga at fara til frelsaran. Tey bíða eftir einari ella aðrari serstakari hending í sálini, tí tey halda, at henda serstaka hendingin ella upplivingin skal geva teimum evnini til at trúgva. — — Men hvar í bibliuni stendur tað skrivað, at syndarar skulu bíða til teir einaferð duga at trúgva? Stendur nakrastaðni skrivað: Trúgv, men ikki enn! Kom, men ikki nú! Bíða til tú hevur gjørt teg tilreiðar! Og bíða eftir teirri røttu upplivingini! — Nei! Men tvørturímóti stendur skrivað: 1 dag, um tú hoyrir rødd hansara, tá herð ikki hjarta títt —

og: Sí, nú er tað ein sonn gævustund, sí, nú er tað ein frelsudagur!

Heldur tú ikki, at Gud er tilreiðar at fyrigeva tær longu í hesi løtu? Man hann ikki vera gjørdur sættur? Ella heldur tú ikki, at Kristus er deyður fyri teg eins væl í dag sum einaferð seinni? Mundi ikki faðirin at hinum burturvilsta soninum standa har heima og bíða við náðini og fyrigevingini, longu áðrenn sonurin kom heim? Og mundu hini bestu klæðini ikki liggja liðug longu frammanundan?

Munnu ikki allir gripir náðinnar vera liðugtgjørdir, so at tú kanst taka ímóti teimum? Ella hvørjum bíðar tú eftir? Minst til orð Krists: Komið higar til mín øll tit, sum arbeiða og ganga undir tungum byrðum, og eg skal geva tykkum hvílu! Er hetta hansara egnu orð? Ja. Og eru orð hansara álítandi? Ja. Verður meðni nakað nevnt um, at vit skulu bíða eftir eini uppliving? Nei. Men hvørjum ivast tú so í?

Og James heldur fram og sigur: »Hygg at fangavaktarum í Filippi. Á teirri somu nátt, sum hann varð vaktur og fekk synd sína at kenna, kom hann til trúgv á Kristus og varð frelstur, og hann »gleddist, tí at hann var komin til trúgv á Gud.« Tá ið hann í sálarkvøl síni rópti: »Hvat eigi eg at gera, at eg kann verða frelstur?« — fekk hann frá ápostlinum hetta svarið: »Trúgv á Harran Jesus, og tú skalt verða frelstur.« Ápostulin talaði einki um, at hann fyrst átti at gera seg tilreiðar, tí at tað vóru ymsar skyldur at uppfylla; men hann segði einfalt: Trúgv! Og sjálvandi var innihaldið hetta: Trúgv nú! Soleiðis skilti hin ræðsluslidni maðurin hann eisini; tí hann trúði beinan vegin orðinum og fekk frið.«

Við hesum er einki prógv ført fyri, at øll skulu ella kunna koma eins skjótt til trúar, — men hetta sýnir fyri okkum, at øll fáa loyvi at koma beinan vegin. Tað sýnir fyri okkum, at hjá Gudi er einki, sum forðar, men at alt er tilgjørt. Og tað sýnir fyri okkum, at gleðiboðskapurin boðar um eina náði, sum longu er tilreiðar, at tað bert stendur eftir at taka ímóti, at koma í brúdleyps. Tú kanst koma sum tú stendur, so syndugur og óverdigur, tú ert, ungur sum gamal, harðhjartaður ella bleytur. Tví fært loyvi at taka ímóti teirri náði, svim er givin okkum í Kristusi, bæði til rættvísi og til halganar.

Rosenius

# Guds tíð fyri Ísmael

**Bjørnar Heimstad, trúboðari**

Bjørnar Heimstad úr Nordkjosbotn í Troms fylke er ein hin kendasti altjóða trúboðarin úr Norðurlondum. Hansara stóru átøk í mongum londum, eisini sterkum muslimskum londum, hava savnað fólk í tíggjutúsunda tali at lurta eftir Jesu evangelium. Hann hevur sæð muslimar í túsundatali taka ímóti Jesusi sum Frelsara í Pakistan, Sudan, Darfur, Tansania og í mongum øðrum londum. Hann brúkar brævaskeiðið hjá Arili Edvardsen "Tað nýggja lívið", tá ið hann vil fylgja hesum mongu nýfrelstu upp. Tað er sum eitt framhaldsskeið. Her ber Bjørnar Heimstad okkum ein týdningarmiklan boðskap, sum vísir, at eitt nýtt "jarntjald", oyðimarkartjaldið, er um at falla:

Eg rokni við, at tú eins og eg sjáldan ella ongantíð hevur hoyrt nógv gott sagt um son Ábrahams, Ísmael. Vit hugsa um hann sum Ábrahams mistak við trælkonuni Hágari og eina framleiðslu í egnari megi. "Ísmael" verður ofta virðismett sum ein mynd av onkrum, vit seta í gongd til egið gagns, uttan at Gud hevur leitt okkum til tað, og sum vit síðani noyðast at stríðast við restina av lívinum. Men Gud hevur eina ætlan eisini fyri Ísmael, og hansara ætlanir verða framdar til fulnar júst í okkara døgum.

Ættarfaðir til yvir 1,2 milliardir menniskju í heiminum í dag

Profeturin hjá islam, Muhammed, var ættaður beinleiðis frá Ísmaeli gjøgnum næsta son hansara Kedar. So her finna vit Bíbliunnar grundarlag og upprunan til teir muslimsku fólkabólkarnar í dag. Á sama hátt kunnu røturnar hjá islam rekjast aftur til Ísmael. Ísmael giftist við konu úr Egyptalandi og fekk 12 synir. Hesir eru ættfedrar til 21 tjóðir á okkara døgum, so sum Egyptaland, Irak, Jemen, Sýria, Libanon, Tunesia, Algeria, Libya, Marokko, Saudiarábia, Sambeindu Emirríkini og fleiri onnur. Hesi muslimsku fólkasløgini vóru til, langt áðrenn tey tóku ímóti islam, og høvdu ein týdningarmiklan leiklut í menningini av Miðeystri, bæði tá ið ráddi um politikk, handil og at taka nýtt land.

Eftirkomarar Ísmaels eru eisini í miðdeplinum í heimstilburðum í dag.

Yvirgangskroppurin Saul, sum seinni varð kallaður Paulus

Eftir 11. september 2001 hevur heimssamfelagið vent sínum eygum móti teimum eindunum innan islam, sum brúka kollvelting og yvirgang.

Fyrsta kirkjuliðið í Ápostlasøguni livdi í ótta fyri tátíðar yvirgangskroppinum, Sauli úr Tarsus. Eisini í dag liva partar af Jesu meinigheit í ótta fyri islam. Ein annar meinlíkur og merkisverdur tilburður her er, at tað eftir øllum at døma ikki var nakar í tí fyrstu meinigheitini, sum sjálvboðin bjóðaði seg fram til tænastu at vitna fyri Sauli. Tí noyddist Jesus sjálvur á ein yvirnatúrligan hátt at opinbera seg fyri honum á vegnum til Damaskusar.

Tað sama hendir í dag. Meðan meginparturin av kristinfólkinum livir í ótta fyri muslimunum, opinberar Jesus seg sjálvur fyri teimum gjøgnum sjónir, dreymar, grøðingar, og við at hann sjálvur vísir seg fyri teimum og talar til teirra. Vitnisburðir í túsundatali streyma inn úr øllum tí islamiska heiminum um slíkar hendingar, sum leiða muslimar til trúgv og frelsu.

Men sum á døgum Sauls reisir Gud eisini í dag upp "Ánanias-tænastur", sum síggja Ísmael gjøgnum Guds eygu, eisini írokað minnilutan innan islam, sum nýtir harðskap. Tað vanliga er, at mong kristin í dag líta at muslimum, so sum fólk fyrr litu at Sauli, men Gud lítur at teimum, sum

hann leit at einum Paulusi í einari tíð sum hesari.

Gud hoyrdi og sá til Ísmael

Í ljósi av evangeliinum og Jesu hjarta, síggja vit, at Gud elskar øll menniskju. Í hansara eygum eru eingi menniskju vorðin til av einum "mistaki" og eru óektað børn og vrakað. Hetta er ein grundleggjandi fatan, sum eigur at gjøgnumseyra alt, vit fáast við í sonevndum "kristiligum virksemi", annaðhvørt tað er í misjón, blaðgreinum, politikki ella meinigheitsarbeiði.

Tá ið Hágar var við barn og gekk við Ísmaeli, fann Eingil Harrans hana í oyðimørkini og opinberaði Guds ætlan fyri henni og soni hennara. Tá ið skrivað stendur Eingil Harrans (við stórum), eri eg vísur í, at hetta var Jesus sjálvur, sum opinberaði seg fyri teimum.
Í øðrum førum, tá ið talan er um einglavitjan, hoyra vit um eingilin Gabriel, Mikal ella bara ein eingil, skrivað við lítlum byrjanarstavi. Men her stendur Eingil Harrans (við stórum í norsku Bíbliuni), og so sum eg síggi tað, er hetta Jesus. Hin sami opinberaði seg fyri Jósva, sum Høvdingi yvir heri Harrans. "Men Eingil Harrans fann hana við vatnlindina í oyðimørkini. Hann mælti: "Hágar, trælkona Sárai, hvaðan kemur tú, og hvar ætlar tú tær?" Hon svaraði: "Eg eri flýdd frá Sárai, húsfrú míni." Eingil Harrans segði við hana: "Vend tú heim aftur til húsfrú tína og gev teg undir vald hennara." Og Eingil Harrans segði við hana: "Eg skal gera avkom títt so fjølmangt, at ikki skal fáast tal á tí vegna fjøld tess."
(1. Mós. 16,7-10)

Gud gav Ísmaeli navn, áðrenn hann varð føddur

Hetta er fyrstu ferð, at Gud gav nøkrum navn, áðrenn tey vórðu borin í heim. Tað er bara komið fyri fýra ferðir í allari Bíbliuni, at onkur hevur fingið navn við guddómligari opinbering. Tað er vorðið profeterað um onnur, men Gud sjálvur hevur ikki givið teimum navn. Hesi fýra eru:

1. Ísmael, sum merkir Harrin hoyrir. (1. Mós 16,11)

2. Ísakur (1. Mós 17,19)

3. Jóhannes doyparin (Luk. 1,13)

4. Jesus (Luk. 1,31)

Ísmael og Ábraham

Ísmael var 13 ár, tá ið Gud opinberaði seg fyri Ábrami og broytti navn hansara til Ábraham. Tá ið Gud skifti orð um sáttmála sín við Ábraham og lyftið hansara at geva Sáru ein son, spyr Ábraham Gud um Ísmael og framtíð hansara.

"Ábraham segði við Gud: "Gævi, at Ísmael mátti liva fyri ásjón tíni!" Gud segði: "Nei, Sára, kona tín, skal føða tær son, ið tú skalt nevna Ísak; við hann vil eg gera sáttmála mín, ævigan sáttmála fyri eftirkomarar hansara eftir hann. Men viðvíkjandi Ísmaeli havi eg bønhoyrt teg; eg vil vælsigna hann og lata hann nørast og fjølgast í stórum; tólv høvdingar skal hann gita; og eg skal gera hann til mikla tjóð." (1. Mós. 17,18-21)
Í 1. Mós. 21,9 lesa vit, at Ísmael happaði Ísak. Ísakur var tá 3 ára gamal. Og í 1. Mós. 21,10-14 lesa vit, at Ábraham dagin eftir blakar Hágar og Ísmael á dyr. Tey fáa bara eitt sindur av vatni og breyði við sær. Ísmael var tá umleið 15 ár.

Ísmael er um at doyggja

Í 1. Mós. 21,15-21 verður greitt frá tí skakandi støðuni, har bæði Hágar og Ísmael eru um at doyggja av tosta og svongd í oyðimørkini. Men "Gud hoyrdi sveinin" (v. 17). Hetta er í samljóði við navnið, Gud gav Ísmaeli. Og hetta er profetiskt fyri Ísmael í okkara tíð. Ísrael var í oyðimørkini í 40 ár. Ísmael hevur verið í einari andaligari oyðimørk í skjótt 4000 ár.

Tá ið Ísmael varð blakaður út úr heimi Ábrahams, uml. 15 ára gamal, var hann ikki bara kropsliga um at doyggja, men eisini hjartað og sálin vórðu knúst av at verða vrakaður. Eftir einari løtu fór hann frá at vera **sonur** til at gerast **trælur**.

Í 15 ár livdi hann við faðirsins kærleika. Hann vaks upp og lærdi, hvør ið Ábrahams Gud er. Og næstu ferð, Ísmael sær Ábraham, er, tá ið hann jarðar hann í Hebron saman við Ísaki. (1. Mós. 25,9) Her gjørdust eisini møguleikarnir aftur at verða sonur jarðaðir. Vónin doyði.

Gud vísir Hágari eina vatnkeldu

1. Mós. 21,19-20 greiðir okkum víðari frá: "Tá læt Gud eygu hennara upp, so at hon sá brunn við vatni í; hon fór og fylti hítina við vatni og gav sveininum at drekka. Og Gud var við sveininum; hann kom til og

búsettist í oyðimørkini og gjørdist ørvagarpur.”

Í dag skjótt 4000 ár seinni eru muslimar í einari andaligari oyðimørk og tysta. Teir duga ikki at síggja Frelsunnar keldu, og vit sum Jesu umboðsmenn hava ikki gjørt nógv at vísa teimum vegin til **tað livandi vatnið**.

Trúboðaraserfrøðingar á US Center for World Mission meta, at tað eru uml. 3000 ónáddir ættarbólkar í muslimheiminum. Men nú hoyrir Gud róp Ísmaels og letur upp eygu teirra soleiðis, at teir kunnu síggja Jesus. Hetta er Guds tími fyri frelsu Ísmaels.

Sjónir og opinberingar av Jesusi

Ein blindur maður úr Pakistan var á pílagrímsferð til Mekka. Meðan hann og fylgisneyti hansara ganga rundan um Kabain (hin svarta steinin), stígur ein maður fram yviri á hinari síðuni, tekur í hondina á honum og sigur: “Eg eri Jesus. Tú hoyrir ikki heima her. Far heim aftur til Pakistan, so skal eg geva tær sjónina aftur!” Blindi maðurin skifti beinanvegin flogferðarseðilin um. Á flogvøllinum, tá ið teir skuldu fara úr Saudiarábia, fór hann so smátt at hóma ljós. Tá ið hann setti føturnar á pakistanska jørð, vórðu eygu hansara fullkomiliga latin upp.

Í einum øðrum arábiskum landi gav lærarin flokkinum, sum taldi 30 børn, nakrar uppgávur, sum tey skuldu gera, meðan hon var úti eina løtu. Beint eftir, at hon fór úr skúlastovuni, kemur ein maður inn og sigur, at hann eitur Jesus. Hann sigur, at Hann er deyður fyri syndir teirra og kann geva teimum ævigt lív. Øll børnini taka ímóti hesum einastandandi tilboði. - Og maðurin hvørvur.

Beint eftir, kemur lærarin aftur, og børnini siga henni um henda Jesus, sum hevur verið í skúlastovuni. Sum frá líður verður stór øsing millum foreldrini. Børnini verða avhoyrd eitt og eitt, og øll søgdu akkurát somu søguna.

Líknandi vitnisburðir streyma inn úr øllum tí muslimska heiminum. Frá teimum mest fjaru ættarbólkunum í Afrika, til Miðeystur, Evropa, USA og restina av heiminum.

Gud hoyrir róp Ísmaels í dag. Gud reisir eisini upp “Ánanias-tænastur”, sum hava fingið lut í Guds opinberingum fyri Ísmaels ætt. Men sum ta ferðina, eru tey tíverri ikki í fleirtali í dag.

Róp Ísmaels

Rópið eftir Gudi og eftir Vatni og Breyði (Jesusi), fær okkum at skilja sálarfrøðina handan róp Ísmaels.

Hví rópar Ísmael í dag? Uttan ein pápa hevur ein sonur ongan samleika (identitet).

Tú gerst **sonur** gjøgnum DNA frá faðir tínum.

Ein trælur hevur sín samleika í sínum **arbeiði**.

Í dag er islam bygt upp sum ein minnisvarði kring róp Ísmaels. Islam merkir: Geva seg upp í hendurnar á Gudi, geva seg undir Gud, sum ein tænari. Islam roynir at fylla tað tóma rúmið í hjørtum muslimanna. Teir vóna, at teir gjøgnum **arbeiðið** kunnu verða góðkendir av Gudi og sleppa undan **dómi**. Og flestallar kirkjur venda sær burtur frá teimum, tí tær óttast atsókn og jagstran. Men nú eru teir so smátt farnir at varnast **Pápa**, sum gevur teimum **vatn** og **breyð**. Gud kallar á muslimarnar í hesi tíðini. Hann hoyrir teirra **róp** og letur upp teirra eygu. Hann vísir teimum Jesus. Gud vil geva teimum samleika (identitet) **nú**.

Ísmael verður føddur av nýggjum! Og gjøgnum Jesus Kristus eru heidningarnir (íroknað skandinavar og muslimar) komnir inn í **signing** Ábrahams.

Trælkonan Hágar er sambært Nýggja Testamenti ein mynd upp á Móses og **lóg jødanna**. Lógin blakaði Ísmael út og gjørdi hann arvaleysan.

**Náðin** í Jesusi Kristi hevur ført Ísmael aftur og inn í signing Ábrahams.

Í Kristi er Ísmael **samarvingi** til lyftini.

Hetta er Guds **tími** fyri muslimska heimin. Ísmael má verða innheystaður, so at heidningafólkini kunnu koma inn í fullum tali, so at Jesus, Kongurin, kann koma aftur.

Og tú og eg kunnu vera Guds frímóðigu Ánaniasar í okkara tíð.

Effie Campbell umsetti.

# Songkvinnan

"Í unglingaárum mínum livdi eg eitt ógvuliga leyslátað og óstýriligt lív," skrivar ein maður, sum seinni vendi um. "Ymiskar umstøður høvdu ført meg inn í eitt lívsstarv, sum var rættiliga sliput og ósømiligt. Eg var nevniliga vorðin stjóri í einum ferðandi tónleikafelagi. Vit struku um bý úr býi í Danmark, Svøríki og Noregi og livdu í yvirflóð og vællevnaði.

Tá ið eg nú hugsi um tað, gerist eg fjálturstungin, og ongantíð kann eg takka og prísa tí miskunnsama Gudi nóg ofta fyri, at eygu míni at enda lótust upp, so at eg klárliga sá, hvar ið mín vegur endaði. Hvussu hetta bar til, skal eg nú greiða frá.

Tað var á sumri 18.., at okkara lítli bólkur á síni fjakkandi ferð endaði í Kristiania, tí býnum, sum nú eitur Oslo. Har høvdu vit eina framførslu í einum undirhaldsstaði, sum nevndist Klingenberg. Í okkara bólki var ein ung kvinna, sum eg her vil kalla Maria P. Hon var dóttur ein heiðurligan handverkara, ein listdreyara í Keypmannahavn. Hon var sera vøkur, og hon hevði fingið eina góða uppaling; men kortini var hon ein av teimum ógudiligastu í bólkinum.

Í Kristiania er ein breið og vøkur gøta, sum eitur Toldbogate. Hon er ovarlaga og hellir oman móti firðinum. Um sumrarnar, tá ið sólin bakar niður, hvílir ein friður yvir hesi gøtu, so at tú næstan heldur, at tú ert staddur úti á bygd, og ein hátíðarligur dámur er yvir øllum. Ein sovorðnan stillan summardag fór Maria P. spákandi eftir hesi gøtu.

Tá ljómaði brádliga veikur, men skilligur sálmasongur fyri oyrum hennara, og so hvørt sum hon kom longur oman í gøtuna, harðnaði songurin so líðandi, til hon kom til ein bygning, har hurðin og vindeyguni vóru opin, og haðani var tað, at songurin kom. Hetta var eitt missiónshús, og møti var inni har. Maria steðgaði og lurtaði. Hon noyddist at steðga. Okkurt óskiljandi noyddi hana, og hon fekk ikki staðið ímóti.

Og meðan hon nú stóð har og lurtaði so hugtikin av tónalagnum í hesum sálmi, sum ljóðaði so hátíðarligur út til hennara í hesi stillu gøtu, fall eitt slør burtur frá sálarinnar eyga, sum hevði verið blindað av verðini og errinskapi og fáfongd.

Minni úr barnaárum trongdu seg fram. Tárini runnu stríð oman eftir kjálkunum, og ræðslan fylti hana, tá ið hon hugsaði um tað lívið, hon livdi. Sum í dreymi fór hon til húsini, har hon gisti, og ein tíma fyri og annan eftir sat hon bara har sum í einum dvala, til tann tíðin kom, at hon mátti fara til arbeiðis í Klingenberg. Tí slapp hon ikki undan.

Eg síggi alt so skilliga fyri mær, sum var tað í gjár. Hesin stóri, hálvmyrki salurin var stúgvandi fullur. Tubbaksroykur og brennivínsdeymur fyltu allan salin, og har sótu hesir roykjandi, prátandi og drekkandi ungu og gomlu menn, allir við meir ella minni skitnum tonkum og bíðaðu eftir, at kvinnurnar skuldu koma fram at syngja.

Tann kvinnan, sum fyrst skuldi á pallin, var Maria P. Klaverleikarin slerdi niður á tangentarnar og gav henni tónan til eina vísu, sum var høgt í metum, men ógvuliga leyslátað og grov.

Tá steig Maria P. fram á pallin - ikki smílandi, uppgjørd og smikursøt sum vant - men rólig, sinnilig og álarsom. Andlitið var sum úr marmor. Hon var í hvítum kjóla og hevði eina blómu í hárinum. Hon hugdi so hissini við einum fjarum eygnabragdi út yvir áhoyrararnar, og við bleytari, vælljóðandi rødd byrjaði hon sangin:

O, du bitre sorgens kilde,
o, du væld af syndig lyst!
Hvem skal hjertet tilfredsstille?
Hvem skal give sjælen trøst?
Hvem kan frelse mig af nød?
Gør det, Jesus, for din død!
Riv mig ud af verdens snare,
oplad mig din himmel klare!

Fader, ak, jeg kan ej tænke
uden sorg og bitterhed,
på de synder, som mig krænke,
og mit hjerte med mig ved.
Da jeg lyst til verden fik,
bort jeg fra dit ansigt gik
for en syndens træl at bliver,
ville ej dig hjertet give.

Ak, det gør mig hjertens kvide,
at så dybt jeg falden er,
Jesus i din åbne side
al min tilflugt jeg begær.
Med dit rene dyre blod
styrk i stridens stund mit mod!
For din bitre død og pine
skænk mig, Jesus, glæder dine!

Meðan hon sang, tagnaði alt skemt og harðmælt prát, sum í fyrstani hevði verið at hoyrt í hesum fjølbroytta skara. Fólk gjørdust púra ovfarin av tí tignarliga friði og álvarsemi, hon hevði á sær. Tað var næstan okkurt guddómligt yvir hesum sálmi, meðan hon kenslusom sang hann við síni bleytu rødd. Ein fullkomin kvirra ráddi í salinum, tá ið songkvinnan fór av pallinum, og mong reistust og fóru stillisliga og hugsanarsom haðani.

Eg kvikaði mær inn í skiftingarrúmið. Eg óttaðist stórliga fyri, at hon skuldi havt mist vitið. Men nei, so var ikki. Tvørturímóti, hon var ógvuliga gløggskygd.

Hon hevði ikki viljað brotið lyftið, hon hevði givið. Men hon fór ongantíð aftur á ævini nakrantíð at syngja annað enn sálmar, boðaði hon frá, ógvuliga avgjørd á málinum.

Eg mátti tí loysa hana frá sáttmála okkara, og eftir eina tíð eydnaðist tað mær at finna eitt hóskandi arbeiði til hennara hjá einari trúgvandi familju. Seinni hjálptu nakrar familjur henni at seta ein gentuskúla á stovn í býnum N.N., og nú er hon ein viðurkend og væl umtókt lærarinna í hesum býi."

"Budskab fra Naadens Rige"
Effie Campbell umsetti.

# Jesus hjálpir í dagsins arbeiði og stríði.

"Men tað bar á, meðan mannamúgvan tyrptist um hann og lýddi á Guds orð, at hann sá tveir bátar liggja í fjøruni, men útróðrarmenninir vóru farnir burtur frá teimum og sótu og reinskaðu gørnini.

Og hann fór tá inn í annan bátin...."Luk. 5,1-3.

Men tað bar so á - soleiðis byrjar henda undurfulla søgan um fiskaveiði Pæturs. Tað var ikki bara hesa einu ferðina, at Jesus hjálpti vinum sínum! Nei, ferð eftir ferð kom hann teimum til hjálpar!

Tað munnu ikki vera mong okkara, sum eru fiskimenn og standa og skola gørn. Men so gera vit okkurt annað. Kanska skola vit borðiskar fyri mammu, ella vit gera skúlating. Kanska vera vit fyri onkrum torførum og tungum, kanska eru vit sorgarbundin um okkurt ella bangin. So kemur hann okkum til hjálpar, sum tá ið hann fór umborð á bátin hjá Pæturi - tí hann er hin sami undurfulli Frelsari, sum tá ið hann gekk her niðri á jørðini.

"Setið gørnini út!" segði hann við Pætur. Hann visti jú, hvussu illa hevði gingist um náttina. "Meistari, vit hava roynt alla nátt og einki fingið," segði Pætur, "men eftir tínum orði vil eg seta gørnini út aftur!"

Gerið tit sum Pætur. Lítið á Jesus! Tá vil Gud vælsigna tykkum gerandisdagin í øllum tí, tit gera - ja, alt lívið!

Sum bátarnir hjá Pæturi og vinmonnum hansara vórðu søkkladnir - soleiðis skal lív tykkara verða fylt av Guds gávum! Staðin fyri skulu tit blaka alla stúran og gremjan "fyri borð" - kasta tær yvir á Jesus, "tí hann hevur umsorgan fyri tykkum!" Ja, hugsið tykkum, hvussu undurfult og stórt tað er: Jesus vil hjálpa okkum!

Ein smádrongur, sum var í dýrastu neyð, bað: "Góði Gud, tú, sum ert so stórur, hjálp mær, sum eri so lítil" - og Gud hjálpti!

Hasa bønina biði eg ofta sjálvur - tað mást tú eisini gera!

Vilhelm Munch.

E. Campbell týddi.

# Rokna við Jesusi - í deyðans stund.

"Tá rópaði hann við harðari rødd: "Lázarus, kom út higar!" Jóhs. 11,43.

Tað er ein løgin tekstur, vit hava fyri okkum í dag, kæru børn. Jóhannes, sum sigur frá, hevur eins og tikið okkum við út á ein lítlan kirkjugarð uttan fyri Betániu. Nú, tað er kanska ikki so løgið kortini, tí kirkjugarðar eru jú allastaðni. Teir liggja uttan fyri hvørja einastu bygd allastaðni í landi okkara - og í øðrum londum. Løn syndarinnar er deyði, sigur Guds orð. Og vit hava øll syndað!

**Tí** er tað soleiðis, og tí standa ofta menniskju og gráta við eina grøv á einum kirkjugarði. Soleiðis var tað eisini henda dagin.

Marta og Maria grótu - eisini Jesus græt, lesa vit. "Hevði tú verið her, tá var bróðir ikki deyður!" søgdu tær við Jesus. Men nú var ov seint. Tær høvdu annars sent boð til hansara, beinanvegin Lázarus var vorðin sjúkur, men tað mesta av einari viku gekk, áðrenn hann kom - og tað er tað, sum er so løgið! Hví kom hann ikki fyrr?

Og hesi trý systkini vóru annars av bestu vinum hansara. Jú, sanniliga er tað løgið - men tað er eisini **undurfult**!

Tí Jesus, sum stendur mitt teirra millum, sigur: "Eg eri uppreisnin og lívið; tann, sum trýr á meg, skal liva, um hann so doyr!"

Og hóast Marta mótmælti og segði, at tað vóru fýra dagar síðani, at hann varð jarðaður, vendir Jesus sær brádliga móti grøvini og býður, at steinurin skal takast burtur - og so rópar hann á Lázarus: "Lázarus, kom út higar!" Og hugsa tær, Lázarus kom út úr grøvini.

Men tað, sum er **mest undurfult av øllum undurfullum**, er kortini, at hetta ikki bara geldur Lázarus. Ein dag kallar hann tey deyðu fram. Tá skulu øll tey, sum trúgva á Jesus, rísa upp úr grøvini. Tey skulu fáa eitt nýtt likam og um ævir búgva í Guds Páradísi!

Jú, tað er stórt at trúgva á Jesus! Send honum boð, tá hjálp tær tørvar her! Og minst til: Hann kemur ongantíð ov seint!

Vilhelm Munch.

E. Campbell týddi.

# Summarstevnan 2008

26. juni – 29. juni í Føroya Fólkaháskúla, Háskúlavegur 14, Tórshavn

Høvuðstalari: Claus L. Munk

Skrá:
Hóskvøldið 26. juni:
Kl. 20.00: Møti við Claus L. Munk, Hjørdis Sunnsker syngur

Fríggjadagur 27. juni:
Kl. 10.00: Bønamøti / Bíbliutími við Jústinus Poulsen
Kl. 16.00: Bíbliutími við Claus L. Munk
Kl. 20.00: Møti við Claus L. Munk, Hans Pauli Jacobsen syngur - Innsavning til missiónsarbeiðið.

Leygardagur 1. juli:
Kl. 10.00: Bønamøti / Bíbliutími við Claus L. Munk
Kl. 16.00 Møti Claus og Tove Munk greiða frá arbeiði teirra
Kl. 20.00: Møti við Claus L. Munk, Árni Petersen syngur - Innsavning til missiónarbeiðið.
Kl. 22.00: Ungdómsmøti, Pól Jóhannes Joensen og onnur skipa fyri

Sunnudagur 2. juli:
Kl. 15.00: Familjumøti
Kl. 18.00: Møti við Claus L. Munk, Jónhard Johansen og onnur syngja

ØLL ERU HJARTALIGA VÆLKOMIN!

Minnist til at biðja fyri Summarstevnuni.

Innsavningar
Á møtinum leygarkvøldið og sunnukvøldið verður høvi at geva eina gávu til missiónsarbeiðið hjá Kirkjuliga Missiónsfelagnum.

Gisting
Møguleiki er at gista á háskúlanum. Ein avmarkað nøgd av kømrum (til 2 persónar) eru. Prísur fyri hvørt kamar hvørja nátt er kr. 250,00 - Bíleggið kamar við at ringja 31 67 50 ella við telduposti til kmf@kmf.fo

Máltíðir
Drekkamuður er eftir møtið hóskvøldið. Frá og við fríggjamorgni og til og við sunnukvøldið fæst morgunmatur, døgurði og nátturði til keyps fyri sámuligan prís.

# Boðanin av Guds orði

»TÁ ID eg síggi, at eitt ella annað felag lýsir við vekingarmøti, kann eg ikki annað enn smílast,« sigur ein av norsku vinum okkara; »tí slíkt hevur lítið við kristindóm at gera. Okkara skylda og forrættindi er at boða Guds orð sum lóg og evan-gelium, og Guds gerningur er tað at geva vøkstur.«

Og fara vit at kanna eftir, hví Kirkjuliga Missiónsfelagið er vorðið til, so finna vit eina av høvuðsorsøkunum júst á hesum øki. Tí at teir menn, sum komu at leiða felagið undir tí navni, sum tað nú hevur, hava frá fyrsta degi verið hart ímóti einum og hvørjum ósunnum menniskjansligum trýsti á møtum og missiónsvikum. Ja, teir beinleiðis rýmdu av onkrari slíkari missiónsviku fyri nú meira enn 25 árum síðani av hesi orsøk. Takk skulu teir hava fyri tað, og eg vil siga tað soleiðis, at tann dagin, tá ið felag okkara víkur frá hesi bíbilsku støðu, hevur tað frásagt sær Guds signing, og hevur ikki longur rætt til at liva.

Eftirtíðin hevur eisini sýnt okkum, hvussu klárt ið hesir menn sóu upp á viðurskiftini. Tí at tey, sum verða umvend við appellini, koma í veruleikanum ongantíð at skilja evangeliið, um tey ikki seinni verða frígjørd við evangeliinum. Her hjálpa ongar kristiligar upplivingar; tí at kristnilívið verður tá einans eitt lógstrev og ein jagstran eftir nýggjum upplivingum, og evangeliið verður fyri teimum ein fremmand tala, sum tey bert við einum stórum Guds undri koma at fáa fatur í.

At tey ungu ikki duga at skilja hetta, er kanska einki at undrast yvir; men hugstoytt er tað, tá ið eldri trúgvandi fólk ikki tykjast at duga at gera mun á apelli og evangelii.

Hjá okkum er lítið at gera við tað. Vit mega bert. biðja Gud um, at hann við síni náði má leiða okkum soleiðis, at hann altíð finnur okkum trúgv í tænastuni fyri gleðiboðskapin. Og trúgv í tí, at boða gleðiboðskapin soleiðis, at tað verður gleðiboðskapurin sjálvur sum býður menniskjum til borðs í Guds ríki.

Ongantíð skulu foreldur noyðast at óttast fyri, at vit leggja børn teirra undir nakað menniskjansligt trýst av nøkrum slagi; men tey skulu vita, at einasta uppgáva okkara er at boða Guds orð fyri teimum og annars styðja tey bæði andaliga og handaliga so langt sum vit røkka. Tey skulu frá barnaárum læra at kenna Hina heilagu skrift, sum kann gera tey vís til frelsu við trúnni á Jesus; og trúnna, ella álitið á Jesus, skal Orðið sjálvt skapa.

Í tí treysti og teirri trúgv vilja vit halda fram í tænastuni, meðan vit líta til hansara — Jesus — sum toldi slíka mótsøgn. Tí at mótsøgnini skulu vit rokna. við, tá ið vit hava valt eina slíka støðu. Ja, royndirnar verða kanska tær, at vit verða løgd undir bæði líkt og ólíkt, og millum annað tað, at vit ikki vilja hava veking, tí vit ikki vilja vera við uppi í slíkum.

Mín persónliga roynd er, at til tess at kunna gera sær nakra hugsan um eina rørslu, noyðist tú fyrst at hoyra tann boðskap, sum fram verður borin, og síggja ta framferð, sum verður nýtt. Sum oftast er henda eina ferðin nóg mikið, og viðhvørt er tað eina ferð ovmikið, tí tú vildi ynskt, at tú ongantíð hevði havt verið. Hesa roynd havi eg gjørt bæði uttanlands og heima.

Sjálv uppgávan er kortini ikki at finnast at, men at fáa sovorðnar menn higar at vitja, sum kunnu boða Guds orð reint og rætt fyri fólki okkara. Og tað vilja vit gera framvegis, so satt sum Gud gevur náði til tess.

Tað er ikki skylda okkara at siga alt kristiligt at vera gott, bert tí at tað verður nevnt kristiligt, men tvørturímóti at sálda tað ígjøgnum Guds orð, og síðani taka greiða støðu til tað, — hvat ið fólk so annars halda, ja, um tey so meta okkum javnt við gólvsóp.

*Esmar A. Jacobsen.*

# Anders Nord

Hvat er hatta fyri eitt navn? Jú, tað er navnið á tí manni, sum búði í tí húsinum, sum stóð fullkomiliga óskalað eftir tann stóra eldin, sum herjaði Ålesund í 1904, har tey flestu av teimum 1100 húsunum, sum vóru í býnum tá, vórðu løgd í øsku.

Her skulu vit hoyra um mannin og umstøðurnar, sum stóðust av hesi ógvisligu hending.

Húsið var bygt úr vanligum timbri eins og øll onnur hús í Ålesund tá á døgum. Hann, sum átti húsið, kallaðist Gunnar Walde. Tí verður hetta húsið nevnt "Walde-húsið". Tað liggur í einum býarparti, har øll húsini vórðu løgd í øsku. Men hetta eina húsið varð standandi - ja, ikki bara standandi, tað fekk als ongan skaða, ikki so frægt sum málingin var sviðin! Av hesi orsøk varð húsið í mong ár kannað og granskað vísinaliga, og mangar løgnar teoriir komu fram. Men eingin skilagóð frágreiðing kom burturúr tí.

Í 1913 varð húsið friðað. Kommunan friðaði húsið, og hvør sum helst kann dagin í dag vitja Ålesund og síggja húsið í Grensegata 2.

Í februar í 1986 sendi NRK eitt brot í sjónvarpinum frá tí árliga minnisdegnum í Ålesund.

Tað varð víst í sendirøðini "Norge Rundt". Har sóu fólk, tá ið mannamúgvan gekk fram við Fjellgata og Grensegata. Tá ið ferðaleiðarin peikaði á Walde-húsið, segði hann skemtiliga við teirri ætlan at gera alt til láturs: "Og her síggja vit húsið, sum Várharra spardi, tá ið maðurin, sum búði har, ikki vildi flyta út ..."

Hetta brotið úr sendingini fekk eina tignarliga, eldri konu úr Tróndheimi at mótmæla harðliga. Millum annað skrivaði hon til NRK og ávaraði tey, ið høvdu ábyrdina, móti at vera so vágin og fyrilitarleys, tá ið tey skuldu greiða frá "húsinum, ið ikki brann". Hon var eisini hin rætta at koma við slíkum mótmæli, av tí at mamma hennara var dóttur Anders Nord!

Klara Skjøstad er navnið á hesi konu, sum altso er abbadóttir Anders Nord. Tá ið vit ætlaðu at vitja hana, fingu vit Birger Forsmo at hjálpa okkum, tí hann kennir stórar partar av Vesturlandinum, og nú í januar 1993 fingu vit ta gleði at tosa við hana í heimi hennara í Tróndheimi.

At tosa við Klaru Skjøstad kennist sum at tosa við ein ungdóm. Hon vísti okkum familjumyndir og segði okkum frá nógvum áhugaverdum í tí stóra sorgarleikinum í Ålesund 1904. "Abbi," sigur Klara, "var ein heilhugaður trúgvandi maður. Hann var eitt trúar- og bønarmenniskja. Regine, kona hansara, hevði ikki heilt tey somu viðurskiftini við Gud, tí tá eldurin kyknaði, og abbi segði, at Harrin hevði lovað at varðveita tey og húsið, gjørdist hon kortini ræðslusligin. Hon bar alt, sum hevði nakran týdning, út í tún at bjarga tí. At enda, tá ið eldsbrunin var beint við, royndu omma og nakrir grannar at fáa abba út við valdi! Men abbi vildi **ikki** út úr húsinum. Hann hevði fingið nakað heilt serligt frá Gudi, tí annars hevði ein slíkur fastleiki og friður ikki verið menniskjansliga møguligur, ið hvussu er ikki í einari sovorðnari ræðandi støðu. Eldsbrunin slóknaði at enda, eftir 16 tímum, seinnapartin 23. jan. Tá stóð hetta húsið eftir, húsið, sum omma og abbi búðu í. Tað stóð púra óskalað eftir. Ikki so frægt sum merki eftir eldin vóru at síggja," sigur Klara Skjøstad.

Kristian Bugge, sum hevur skrivað "Ålesunds Historie" sigur frá hesi hending á síðu 320 í bók síni: Í einum húsi í Grensegaten búði ein gamal maður, sum hevði biðið Gud gjørt tað soleiðis, at tað húsið, sum hann búði í, ikki mátti brenna. Og hann var so vísur í, at Gud hevði hoyrt bønina, at hann partú ikki vildi út. Tá ið familjan og hini, sum búðu í húsinum, ikki høvdu somu trúgv sum hann, tóku tey hann við valdi út úr húsinum. Men tá ið eldhavið var farið um henda býarpartin, tá kom fyri ein dag, ja, løgið var tað, at øll onnur hús allastaðni har vóru brunnin í grund; men hetta húsið stóð púra óskatt, og tað stendur har dagin í dag, hóast hetta var eitt timburhús sum øll onnur.

" Harald Grytten, sum hevur givið bókina "Ålesund Forteller" út, hevur á síðu 45 eina mynd og

sigur soleiðis um hana: “Eitt annað áhugavert á myndini er húsið, sum stendur fremst. Hatta er tað viðgitna Waldehúsið á horninum Fjellgata Grensegata, sum varð standandi, meðan øll húsini kring tað brendu.

Frásagnir á fólkamunni vilja vera við, at ein teirra, sum búði í húsinum, fekst ikki út haðani. Hann var vísur í, at húsið fór at verða spart. Men skyldfólk hansara, sum ikki vóru líka sterk í trúnni, lupu inn at bjarga tí, sum bjargast kundi. Mannin fingu tey ikki við sær, bara klæði hansara og nakað av innbúgvi. Hetta bóru tey oman í Parkina, og har brann alt upp. Men húsini vórðu altso standandi í øllum góðum.”

Tað er at undrast á, at fólk ikki hava vent sær til Anders Nord sjálvan og spurt hann, hvat ið hann helt, og hvussu alt hetta hekk saman. Fólk undraðust stórliga og vóru uppøst um hetta fyribrigdið. Tað hevði verið so líka til at biðið mannin komið við sínari viðmerking. Av tí at hann bar seg so heilt serliga at undir vanlukkuni - soleiðis sum bæði hansara núlivandi skyldfólk og álítandi søguskrivarar vátta - áttu allir myndugleikar, almennir sum privatir, at sett seg í samband við hann og lurtað eftir hansara frásøgn og sæð til, at eingin, sum umboðaði býin, skuldi sloppið at komið við óreiðiligum og nasvísum viðmerkingum.

So vítt sum vit vita, finst eingin beinleiðis samrøða við Anders Nord í verðsligum høpi. Men Harrans vegir eru eisini í hesum føri “órannsakandi”. Róm. 11,33. Ein septemberdag í 1913 spákaði Peter Relling á teimum leiðunum uttan fyri Ålesund, har ellisheimið var. Av tí at hann visti, at Nord nú var fluttur higar, gjørdi hann av at fara at hitta hann. Tað var ein sunnudag seinnapart, og fleiri onnur vóru eisini har og vitjaðu. Men at enda eydnaðist tað Relling at sleppa at hitta Nord og konu hansara einsamøll. Fyrst samtalaðu tey um tær vanligu síðurnar av okkara kristnilívi, og so spurdi Relling, um hann kundi sleppa at hoyra frásøgnina um býarbrandin av egna munni Nords. “Ja, sært tú,” segði Nord, “dagin fyri, tann 22. januar kl. eitt seinnapartin var eg einsamallur inni í stovuni. Í tí at eg hyggi upp, gerist eg varur við ein stóran og lýsandi eingil, sum stendur mitt á gólvinum. Eg gjørdist beinanvegin so bangin og spurdi: “Hvat er tað, Harri?” Men hann segði: “Óttast ikki! Eg eri sendur frá Gudi tí almáttuga at siga tær, at í hesi nátt skal allur hesin býurin leggjast í øsku vegna tær mongu og stóru syndir, sum fara fram her. Men tú hevur funnið náði hjá Gudi - og tú og kona tín skulu ikki fara út, og einki av tí, sum tit eiga, skulu tit bera út, tí alt, sum verður borið út, verður uppkolað. Eg skal varðveita tykkum, og einki ónt skal raka tykkum.”

So segði hann: “Eru tit villig?” Eg svaraði: “Ja, Harri.” So segði hann: “Friður veri við tær.” Síðani fór hann uppfrá og hvarv.

Tá ið kona mín seinni kom inn, og eg segði henni tað, sum var hent, gjørdist hon frá sær sjálvari, men segði einki. Umleið 2.15 um náttina dundraði brandkanónin, og samstundis brast eitt ræðuligt ódnarveður á, kolandi stormur av vestri. Himmal og hav stóðu í einum roki. Tá sá eg úr vindeyganum eldin langt har úti.

Hann býtti seg í 14-15 ymiskar leiðir, og við fúkandi ferð nærkaðist hann í hvørjum. Kona mín fór at bera ein lutin fyri og annan eftir út, ja, eisini gardinurnar. At enda var bara ein tóm song og ein stólur eftir. (Og alt, sum hon bar út, brendi.) Um middagsleitið var eldurin tætt upp at okkum. Eg læt Bíbliuna upp og las úr Sálmi 91, meðan logarnir og roykurin sveipaðu seg um húsini. Tá ið ein løta var farin, fór eg á føtur og hugdi út. So langt sum eygað rakk, vóru bara gløðandi øskudungar at síggja, men inni hjá okkum var ikki heitari, enn tað er her í dag,” legði hann afturat.

Soleiðis greiddi Anders Nord frá tí, hann hevði sæð og upplivað undan og eftir eldsbrunavanlukkuna í 1904, sambært ta samrøðu, sum hann hevði við Peter Relling í 1913.

Árið eftir flutti Nord heim til Gud, 79 ára gamal. Hvør var so hesin Relling? Heimildarmaður okkara, Forsmo, hevur fyri stuttum tosað við fólk, sum minnast Relling. Hann var úr Ålesund, búði einsamallur og hevði eina hárskerastovu í býnum. Hann var persónliga trúgvandi og hoyrdi til eina meinigheit í býnum. Henda mannin brúkti Gud at føra pennin, so at vitnisburðurin hjá Nord kundi festast á blað, umleið níggju ár eftir býarbrandin og bara eitt ár undan deyða hansara. Eftir henda vitnisburðin mugu vit bara sanna, at í einum av okkara norsku býum stendur eitt prógv um Guds almátt, nevniliga í Grensegata 2 í Ålesund! Henda opinberingin, sum Nord fekk, er einasta skilagóða frágreiðingin uppá, hví hann var so viljafastur og róligur undir allari vanlukkuni. Hevði hann ikki fingið eitt guddómligt lyfti, hevði tað verið ógjørligt hjá einum sunnum,

ábyrgdarfullum familjufaðir at bera seg soleiðis at!

Og Nord var ein sovorðin maður, við tignarligum eginleikum bæði sum menniskja og trúgvandi, tað kann núlivandi abbadóttir hansara, Klara Skjøstad vátta.

Vit prísa Gudi fyri teir veruleikar, sum nú eru komnir fyri dagsins ljós, og bøn okkara er, at boðskapurin skal verða tær til signingar og lív í trúnni á Frelsara okkara Jesus Kristus! "Og Sjádrak, Mesjak og Ábed-Nego gingu **tá út úr eldinum** ... og teir sóu, hvussu eldurin **ikki** hevði bitið á likamum teirra ... hárið var ikki sviðið ... einki plagg á teimum var skalað, ja, ikki so mikið sum sviðin roykur gekk at teimum." Lesið sjálv 3. kapittul hjá Dánjali.

Effie Campbell, týddi

## Nýggir haldarar

Eg ynski at halda "Kirkjuligt Missiónsblað".

Navn: ______________________

Bústaður: ______________________

Postnr. og bygd/býur: ______________________

Undirskrift: ______________________

*At senda til:*
Kirkjuligt Missiónsblað, Purkugerði 7, FO-100 Tórshavn

# BARNASÍÐAN

## Traktatin við krossinum á

TERJI og eg vóru góðir vinir. Hann kom ofta at vitja meg, og vit høvdu nógvar góðar løtur saman. Onkuntíð hevði hann appilsinir við sær eisini. Og so sótu vit og lósu. Terji dugdi ikki at lesa enn; men so segði eg honum frá tí, sum stóð at lesa. Og viðhvørt lósu vit í bílætabókum og bløðum, ella hugdu eftir bíløtum hjá fastur.

Ein sunnudag sá eg eina reyða topphúgvu millum trøini niðri við vegin. — Jú, tað var Terji, sum kom. Hann fór beinanvegin yvir til kurvina, sum bløðini vóru í, tá ið hann kom inn í stovuna. — »Skulu vit ikki lesa?« spurdi hann, ímeðan hann leitaði eftir onkrum spennandi.

Men har lá eitt líti blað ímillum øll hini, sum hann tók upp í hondina. Tað stóð nógv at lesa í tí, og so var ein so sjáldsom mynd uttaná. Hetta var ein traktat. Á myndini vóru tveir træplankunum negldir saman til ein kross, og á krossinum var ein maður negldur fastur.

»Hvør er hasin maðurin?« spurdi Terji og peikaði á mannin, sum hekk har, ímeðan hann kreyp upp í stólin til mín.

»Hatta er Jesus,« greiddi eg honum frá.
»Er tað Jesus?« Tað helt Terji vera merkiligt, tí hann hevði hoyrt so nógv um Jesus, og hann visti at hann var góður við øll og við seg eisini.
»Hví hongur hann har?« Terji helt tað vera óneyðugt, at Jesus skuldi líða slíkan deyða.
»Tað vóru nakrir sum drópu Jesus, av tí at teimum dámdi hann ikki.«

»Men hví negldu teir ígjøgnum hendurnar á honum?« Terji hugdi gjølla at myndini og síðani at sínum egnu hondum; hann visti, at bert ein knappanál bar við hondina, so fekk hann ógvuliga ilt.

»Ja, tað var ringt; men so nógv mátti Jesus lýsa fyri okkara skuld.«

»Hevði eg verið har, so skuldu teir aldrin sloppið at gjørt tað,« segði Terji, tí hann dugdi ikki at skilja, at teir kundu gera hetta.

»Men hevur tú ongantíð gjørt nakað skeivt nakrantíð?« spurdi eg.

Terji hugdi niður. Tað var ikki so stuttligt at tosa um tað nú.

»Tú veitst, at eg át øll súreplini hjá fastur einaferð,« segði hann stillisliga.

»Ja,« segði eg, »tú veitst, at vit hava nakað í okkum, sum vil gera tað illa; men tað er ikki Guds vilji; hann tolir ikki, at vit gera tað, sum ilt er. Hann vil ikki, at vit skulu vera so; men vit kunnu ikki lata vera, tí at vit eru ónd innan, og tað er tað sum er synd.

»Ja, men hví mátti Jesus doyggja á krossinum?« Terji hugdi við sama lag at myndini.

»Jú, tú veitst, at Gud sendi Jesus her til jarðar, fyri at hann skuldi doyggja í okkara stað. Tí tú veitst, at vit eiga at verða revsað, tá ið vit ikki eru soleiðis, sum vit eiga at vera.«

# BARNASÍÐAN

Jú, Terji mintist, at hann einaferð noyddist at fara í song, tí at hann var ólýðin.
»Men so tók Jesus okkara revsing á seg,« segði eg.

»Gjørdi Jesus alt hetta fyri meg?« Terji hugdi einaferð enn upp á tær hendurnar, sum vóru negldar á krossin.

Eg játtaði, og Terji fekk so við og við fatur í tí; men tað var so ringt at skilja tað kortini. Hann hugdi upp á myndina einaferð aftrat, og segði so við einum smíli: »Tá var Jesus góður við meg.« Men so gjørdist hann knappliga álvarsamur aftur, og sat leingi og undraðist yvir hetta.

»Ert tú ikki glaður fyri tað?« spurdi eg.

»Jú, men noyddist hann at doyggja? Slapp hann ikki at liva longur, tá ið tað ikki var hansara skuld?« Hetta helt Terji vera syrgiligt.

Tá fór eg eftir teirri stóru mynda-bíbliuni og vísti Terja eina av myndunum.

»Hvat sært tú har?« spurdi eg.

»Tað er eitt lítið rúm inni í fjallinum, og so liggur ein stórur steinur uttanfyri.

»Kanst tú síggja um nakar er inni í rúminum?« spurdi eg aftur.

Terji fór við nøsini heilt niður í bókina; men hann bara risti við høvdinum.

»Nei, eg síggi einki, uttan bara nøkur hvít klæðir sum liggja har.

»Tú, Terji,« segði eg, »hatta líttla rúmið í fjallinum er tann grøvin, har sum teir løgdu Jesus; tí sovorðnar gravir brúktu teir tá. Men tá ið vinir hansara tveir dagar seinri komu út til grøvina, funnu teir ikki Jesus. Teir funnu bara klæðini, tí Jesus var risin upp. Hetta hevði einki menniskja kunnað gjørt; men tú veitst at Gud kann gera alt.«

»Ja, nú skilji eg tað. Tí er tað, at tú hevur sagt við meg, at Jesus er altíð hjá mær; tí tað kann hann bara vera um hann livir!« Terji helt, at hann hevði fingið nógv burturúr í dag, og tað hevði hann eisini.

»Ja,« segði eg, »og tí er tað, at vit kunnu tala við hann og trúgva orði hansara. Vit kunnu ikki síggja hann við eygum okkara, men hann sær okkum.«

»Ja, Jesus kann alt,« segði Terji og legði bíbliuna saman. Síðani tók hann traktatina upp í hondina og spurdi: »Kann eg ikki sleppa at eiga hesa myndina við Jesusi á krossinum?«

Og hana slapp hann sjálvandi at eiga. Vit funnu ein pakka í køkinum, og so fekk Terji myndina heim við sær.
»Hesa myndina fari eg at »lesa« í kvøld, áðrenn eg leggi meg at sova,« segði Terji, tá ið hann var liðugur at fara. »Og so vil eg takka Jesusi fyri, at hann vildi gera alt hetta fyri meg.«

*Elsa Nielsen* týddi.

Postavgreitt blað

# Tann, sum trýr á Sonin, hevur ævigt lív

»Tann, sum trýr á Sonin, hevur ævigt lív; men tann, sum er syninum ólýðin, skal ikki síggja lívið, men vreiði Guds verður verandi yvir honum.« Jóh. 3,36.

Eg komi her at hugsa um danskan trúboðara, sum kom í ferðalag við sølumanni. Tá ið sølumaðurin varð spurdur, hvat ið hann hevði at bjóða fólki, segði hann, at hann seldi teimum snarljós-avleiðarar at hava á tekjunum, so at húsini ikki skuldu verða oydd av eldi, tá ið toran gekk.

Hetta gav trúboðaranum høvi til at tala við hann um onnur viðurskifti hesum lík. Hann helt tí fyri: »Ja, men so eru vit starvsfelagar, báðir.« Síðani greiddi hann honum frá, hvørji snarljós her var talan um. Her vóru tað ikki toruljós, men Guds vreiði, tí at Gud er oyðandi eldur.

Tann, ið hevur snarljósavleiðara á tekju síni, er í ein vissan mun sloppin undan náttúrunnar vreiði, meðan hin, ið ongan hevur, verður verandi undir henni.

Fagnaðarboðini til okkara eru tey, at Gud hevur givið son sín til frelsu. Hann varð upphevjaður til tess at taka á seg vreiðina og veita okkum lívið.

Snarljósavleiðarin, ið trúboðarin hugsaði um, var Golgata krossur, har Jesus læt seg verða hongdan, til tess at vit har skulu sleppa undan vreiðini. Og við Golgata kross er vreiðin ikki bert í ein vissan mun burtur; har er hon fullkomiliga burtur, men eisini bert har.

Men eitt er, sum eg ikki dugi, sigur tú, og tað er at koma til Golgata kross, sum tikið verður til. Og har skilji eg teg væl, tí tað dugi eg heldur ikki. Øll tala um tað, ið vit skulu gera, hevur eisini lyndi til at føra okkum skeivar leiðir.

At koma til Golgata kross er at hoyra orðið um tað, sum Gud í Jesusi Kristi hevur gjørt fyri okkum, og trúgva tí. Tað er at geva Guds orði rætt, bæði tá iS hann talar um synd og um frelsu og um dóm og um náði; ella sagt við fáum orðum, tað er at líta á hitt fullgjørda verkiS á Golgata.

*E. A. J.*

**Umbróting:** Brandur Petersen

**Prent:** Estra

**Ábyrgd:** Kristian Thorleifsson

**Útgevari:** Kirkjuliga Missiónsfelagið
Purkugerði 7
FO-100 Tórshavn
Tlf.: 225511
T-postur: kmf@kmf.fo
Heimasíða: www.kmf.fo
Konta: 9181-495.337.3

Kirkjuligt Missiónsblað kemur út 8 ferðir um árið (1/2, 15/3, 1/5, 15/6, 1/8, 15/9, 1/11, og 15/12)

Haldaragjald: kr. 150,-